# Lønirnar í Havnini eru tríggjar ferðir so høgar sum í Suðuroy

*Ein nýggj kanning vísir, hvussu grefligur munurin er á livikorunum í Suðuroynni afturímóti aðrastaðni í landinum. Eitt nú eru miðal lønirnar fyri hvørt fólk tríggjar ferðir hægri í Suðurstreymoy, enn tær eru í Suðuroynni*

| í % | Norðuroyggjar | Suðuroy | Eysturoy | Suðurstreymur |
|---|---|---|---|---|
| 1930 | 12.6 | 22.8 | 23.0 | 17.7 |
| 1935 | 12.9 | 22.1 | 23.3 | 18.2 |
| 1945 | 13.7 | 20.8 | 23.7 | 18.8 |
| 1950 | 14.2 | 20.0 | 22.3 | 21.1 |
| 1955 | 15.0 | 19.3 | 21.7 | 22.1 |
| 1960 | 14.9 | 17.7 | 21.6 | 24.7 |
| 1966 | 14.2 | 15.3 | 20.6 | 29.9 |
| 1970 | 14.1 | 14.4 | 21.0 | 32.0 |
| 1977 | 13.7 | 13.7 | 21.5 | 32.7 |
| 1987 | 13.0 | 12.7 | 22.0 | 34.3 |
| 1992 | 13.5 | 12.0 | 21.4 | 31.4 |
| 1998 | 12.7 | 11.2 | 22.1 | 35.9 |

***Talva 1:** Hendan talvan vísir gongdina í fólkatalinum ymsastaðni í landinum, og sum tað sæst, er Suðuroyggin fullkomiliga smokkað niður ímillum. Í 1930 búði 22,8%, ella næstan fjórðihvør føroyingur í Suðuroynni. Nú býr bara níggjundi hvør føroyingur í Suðuroy- 11,2%. Samstundis hava bæði Eysturoy og Norðoyggjar hildið tørn. Gongdin í Suðurstreymoy talar fyri seg*

Áki Bertholdsen

– Skal Suðuroynni verða lív lagað, er tað neyðugt at seta tiltøk í verk í stundini.

Hetta er tann stutta og greiða niðurstøðan hjá fýra studentaskúlanæmingum í Suðuroynni.

Teir fýra næmingarnir í 3 G, sum er tað seinasta árið á studentaskúlanum, hava gjørt eina uppgávu, sum vísir, hvussu grefligur munur er á ymsum viðurskiftum í ymsum landspørtum í Føroyum.

Kanningin er bygd á upplýsingar úr Árbókini fyri Føroyar og á tilfar frá Hagstovu Føroya, umframt aðrastaðni frá.

Eitt nú vísa teir á gongdina í fólkatalinum, inntøkuviðurskiftini o.s. fr.

– Saman við sváru kreppuni hevur flytingin til miðstaðarøkið ført til eina stigvísa oyðing av útjaðaranum, siga teir fýra næmingarnir, Rakul Vang, Debora Hjelm, Elin Mortensen og Rúni Nielsen, sum hava gjørt kanningina við Ole Laursen, lærara, sum vegleiðara.

Tey siga, at endamálið við uppgávuni er at lýsa støðuna í ymsum pørtum í landinum við veruligum tølum.

Fyri at lýsa støðuna, hava tey samanborið ymisk viðurskifti í trimum pørtum í Føroyum afturímóti Suðurstreymoy.

Talan er um Suðuroynna, har 4.974 fólk búðu beint fyri jól, tá ið kanningin varð gjørd, umframt Norðoyggjar, har 5.787 fólk búðu, Eysturoynna við 9.934 fólkum og Suðurstreymoy við sínum 16.385 fólkum.

Tey hava ikki nakra uppskrift uppá, hvat kann gerast fyri at venda gongdini.

Men við tølum og myndum vísa tey á, hvar tað er mest átrokandi at seta tiltøk í verk skal gongdin vendast.

Og tað er heilt greitt, at Suðuroyggin er nógv ringast fyri av hesum fýra økjunum, sum verða viðgjørd í kanningini.

### Minkaði 13%

Á talvu eitt sæst, hvussu gongdin hevur verið í fólkatalinum ymsastaðni í landinum tað mesta av hesi øldini.

Og sum tað sæst hevur Suðuroyggin als ikki megnað at fylgt við restini av landinum.

Talvan vísir, at í 1930 búðu 22,8% av øllum føroyingum í Suðuroynni, tað er næstan fjórðahvørt fólk.

Men nú búgva ikki meiri enn 11,2% av føroyingum í Suðuroynni, tað er ikki meiri enn níggjundahvørt fólk.

Samstundis hava bæði Norðoyggjar og Eysturoy hildið tørn sum sín part av fólkatalinum.

Í kanningini verður víst á, at ikki minst kreppuárini frá 1989 til 1995 fóru illa við Suðuroynni, tí bara hesi seks árini minkaði fólkatalið í okkara syðstu oyggj heili 13%. Og gongdin tey fýraárini frá 1995 til 1998, hevur eisini verið nøkur prosent tann skeiva vegin. Tølini fyri 1999 var ikki liðug, tá ið kanningin varð gjørd, so tey eru ikki tikin við í kanningina. Men tey høvdu ikki broytt myndina

### Øgiligur munur á lønini

Men hvussu illa Suðuroyggin veruliga er fyri afturímóti restini av landinum, sæst eina best av talvu 2, sum vísir, hvussu stórur munur er á lønarútgjaldingunum fyri hvørt fólk í ymsum pørtum í landinum.

| 1999 (jan.-sept.) | Norðuroyggjar | Suðuroy | Eysturoy | Suðurstreymur |
|---|---|---|---|---|
| Fólkatali | 5787 | 4974 | 9934 | 16385 |
| % av landinum | 12.8 | 11.0 | 22.0 | 36.3 |
| løn pr. íbúgva | 65.560,74 kr | 52.513,07 kr | - *) | 152.615,20 kr |

***Talva 2:** Hendan talvan vísir munin á miðal lønunum í Norðoyggjum, Suðuroynni og í Suðurstreymoy. Í miðal eru lønirnar fyri hvørt fólk yvir 152.600 krónur. Í Suðuroy er miðallønin ikki meiri enn næstan 52.500 krónur fyri hvørt fólk.*

Tí hendan talvan vísir, at lønarútgjaldingarnar fyri hvørt fólk, eru tríggjar ferðir so høgar í Suðurstreymioy, sum tær eru í Suðuroynni.

Og tær eru eisini væl lægri í Suðuroynni, enn tær eru í Norðoyggjum.

Talvan vísir, at í Suðurstreymoy er miðallønin fyri hvørt fólk 152.615,20 krónur um árið.

Í Suðuroynni er miðallønin fyri hvørt fólk hinvegin ikki meiri enn 52.513,07 krónur.

Í Norðoyggjum er hon 65.560,74 krónur.

Ongin tøl eru fyri Eysturoynna um lønarviðurskiftini, tí í Árbókini eru hon ikki tikin undir einum.

Kanningin hjá teimum fýra studentaskúlanæmingunum vísir eisini, at frá 1995 til il 1998, er lønarútgjaldið í Suðurstreymoy hækkað 342 milliónir tilsamans í rundum tølum.

Í Norðoyggjum er hækkingin 11 milliónir, í Megineysturoy 215 milliónir og í Suðuroynni eru lønarútgjaldingarnar hækkaðar 98 milliónir tey fýra árini frá 1995 til 1998.

Og sum tað sæst, er vøksturin í Suðurstreymoy so stórur, at hann er størri enn vøksturin í hinum trimum økjunum tilsamans.

Og bara hækkingin í lønarútgjaldingunum í Suðurstreymoy er næstan líka stór sum allar lønarútgjaldingarnar Norðoyggjum tilsamans, tí í Norðoyggjum vóru 379,4 milliónir útgoldnar í lønum í fjør, og bara vøksturin í Havnini er 341,9 milliónir tey fýra árini frá 1995 til 1998.

Hetta kann eisini setast í sambandi við fólkatalið. Og tá sæst, at hóast tað „bara“ býr gott tríggjar ferðir so nógv fólk í Suðurstreymoy, sum tað býr í Suðuroynni, eru lønarútgjaldingarnar í Suðurstreymoy næstan 10 ferðir so høgar um árið, sum tær eru í Suðuroynni.

| mió. kr. | Norðuroyggjar | Suðuroy | Megineysturoy | Suðurstreymur |
|---|---|---|---|---|
| 1995 | 368.2 | 163.1 | 374.0 | 2158.7 |
| 1996 | 302.1 | 192.4 | 435.1 | 2264.4 |
| 1997 | 336.8 | 212.0 | 489.2 | 2389.5 |
| 1998 | 379.4 | 261.2 | 589.5 | 2500.6 |

***Talva 3:** Hend talvan vísir samlaðu lønarúgjaldingarnar í ymsum pørtum í Føroyum tey fýra árini frá 1995 til 1998. Sum tað sæst er bara vøksturin í Suðurstreymoy næstan líka stórur sum samlaðu lønarútgjaldingarnar í Norðoyggjum*

**Vit hava meiri um tað forvitnisligu kanningina hjá studentaskúlanæmingunum á Miðnámsskúlanum í Suðuroynni í blaðnum í morgin**

# Hava lakt lok á Suðuroyar Sjúkrahús

Áki Bertholdsen

Tey yvir 100 fólkini, sum tilsamans arbeiða á Suðuroyar Sjúkrahúsi komu inn í ta nýggju øldina í líka stórari óvissu, sum tey fóru úr teirri gomlu øldini.

Tí enn er onki avgjørt um, hvør lagnan verður hjá sjúkrahúsinum, eftir at løgtingið ikki vildi hækka játtina so nógv, sum leiðslan á sjúkrahúsinum segði var neyðugt fyri at tað skuldi bera til at varðveita sjúkrahúsið í 2000 á sama støði sum í fjør.

Fundur hevur verið ímillum umboð fyri almanna og heilsumálastýrið og leiðsluna á sjúkrahúsinum um støðuna, men partarnir eru samdir um at halda tætt til eitt úrslit fyriliggur

Leiðslan á sjúkrahúsinum hevur víst á, at skuldi sjúkrahúsið varðveitast á sama støði, sum í fjør, var tað neyðugt at løgtingið játtaði tvær milliónir meiri enn tað gjørdi.

Men tað vildi tingið ikki.

Og avleiðingin av tí er, at ímillum 12 og 16 fólk mugu sigast upp. Fólk hava so langa uppsagnartíð, tey flestu 3-6 mánaðir og tí er tað neyðugt at siga so nógvum fólkum upp fyri at halda játtanina, tí sjúkrahúsið verður ikki leyst av fólki fyrrenn í fyrsta lagi einaferð í vár ella í summar, og sostatt skal alt sparast in uppá 3/4 til 1/2 ár.

Tilsamans eru 67, 2 fulltíðarstørv á Suðuroyar Sjúkrahúsi og talan er sostatt um at siga 20-25 av størvunum upp. Og so kann sjúkrahúsið ikki virka sum sjúkrahús longur, hevur annar yvirlæknin á sjúkrahúsinum, Bogi Djurhuus, áður sagt fyri Sosialinum og sjálvur mátti hann umhugsa sína framtíð á sjúkrahúsinum. Leiðslan á sjúkrahúsinum hevur eisini boðað frá, at talan er um so ógvuligsar sparingar, at tað kann ikki gerast við at siga einstøkum fólkum upp.

Tí skal játtanin haldast, er tað neyðugt at taka heilar funktiónir av. Og tað er ein uppgáva, sum landsstýrið sjálvt má taka støði til, hvørjar funktiónir skulu takast av. Fyri jól fekk leiðslan á sjúkrahúsinum boð frá almanna og heilsumálastýrinum um ikki at seta nøkur tiltøk í verk, fyrrenn fundur hevði verið ímillum sjúkrahúsið og almanna og heilsumálastýrið. Tann fundurin var ímillum jól og nýggjár, men partarnir eru samdir um onki at siga enn.



# Sløkkiliðið í Havn lítið at gera um ársskiftið



*Sløkkiliðið í Havn hevði óvanliga lítið at gera um ársskiftið. Onki fréttist um brandskaðar ella skaðar av fýrverki annars, sigur varaleiðarin á sløkkiliðsstøðini í Havn, Kartni Jacobsen*

Jákup Bogi Joensen

- Tað letur til, at fólk hava tikið ávaringarnar um nýtslu av fýrverki í størsta álvara. Hetta sigur varaleiðarin hjá Tórshavnar sløkkiliði, Kartni Jacobsen, við Sosialin.

Heili tíggju mans vóru til arbeiðis á sløkkiliðsstøðini í Havn nýggjársaftan, men Kartni Jacobsen vísir tó á, at hetta var meira fyri at tryggja seg móti tí so nógv umrødda ár 2000 trupulleikanum.

- Vit høvdu óvanliga lítið at gera, og eg má siga, at hetta var eitt nýggjár av teimum heilt frægu. Vit fingu ikki eina uppringing, og sum heild haldi eg, at fólk hava ansa sær meira hesaferð enn seinastu árini, tá talan kemur til fýrverk, sigur Kartni Jacobsen.

Eini hús á Argjum fóru illa um nýggjársskiftið, men Kartni Jacobsen sigur við Sosialin, at húsini vóru ov illa sikraði, og tí ikki stóðu til at bjarga.

Varaleiðarin á sløkkiliðsstøðini í Havn sigur, at teir hava ikki frætt um nakrar skaðar runt um landi, sum kunnu setast í samband við nýggjárshaldið.

Av sløkkiliðsstøðini frætta vit annars, at teir komu inn í nýggja árið á besta hátt.

- Vit vóru tíggju mans til arbeiðis og saman við konum og børnum okkara, høvdu vit ein góðan døgurða á støðini, og aftaná skutu vit eitt sindur av fýrverki. Jú, vit høvdu eina hugnaliga løtu saman, og alt gekk upp á stás, sigur Kartni Jacobsen, varaleiðari á sløkkiliðsstøðini í Havn.

## Friðarligt í Havn á nýggjárinum

*Tað hevur sum heild verið sera friðarligt í Havn á nýggjárinum. Talan var bert um smærri tilburðir, sigur Súni Winther støðleiðari í Havn*

Jákup Bogi Joensen

Tað hevur verið sera friðarligt um ársskiftið.

Av løgreglustøðini í Havn frætta vit, at talan bert var um smærri tilburðir. Ein rútur brotnaði í eysturbýnum, tá fýrverk varð kastað inn í hann. Nýggjársnátt var løgreglan í Havn tó boðsend tríggjar ferðir vegna húsaófrið, og uttan fyri róðrarneystið á Argjum, komu fólk til hjálpar, tá tveir mans fóru til hendurs.

Súni Winther, støðleiðari í Havn sigur við Sosialin, at talan sum heild var um eitt sera friðarligt nýggjárshald.

Sosialurin fréttir annars, at talan í flestu býum og bygdum hevur verið um eitt gott og friðarligt nýggjár.

## Fekk stóran skaða

*Ein smádrongur í Leirvík fekk stóran skaða, tá rakettin hann stóð við í hondini brádliga brast.*
*Av løgreglustøðini í Runavík frætta vit annars, at talan var um eitt rokaligt nýggjár*

Jákup Bogi Joensen

Nýggjárshaldið í Eysturoynni hevur verið eitt sindur meira rokaligt enn aðrastaðni í landinum.

Størsta óhappið hendi í Leirvík, har ein smádrongur fekk stóran skaða í hondina. Júst sum hann var farin at rigga seg til, sprongdist rakettin hann stóð við í hondini. Drongurin, sum við skundi var fluttur suður til Havnar, hevur mist eitt petti av einum fingri.

Av løgreglustøðini í Runavík frætta vit, at teir hava havt úr at gera.

Nýggjársaftan fekk løgreglan fráboðan um innbrot á bókasavninum í Fuglafirði, har tveir rútar vóru brotnaðir.

Nýggjársnátt var løgreglan boðsend, tí húsaófriður valdaði í Skálabotni.

Eisini vóru tveir rútar brotnaðir í einum pylsuvogni, og ein jakki varð stolin í dansinum í Runavík.

Ein var tikin fyri at koyra við kenning.


THE DUBLINERS

Aldarinnar konsert 8. januar 2000
í høllini á Hálsi.



Sølustø›ini eru hesi:
Nor›oyggjar: Statoilstø›in í Klaksvík
Kioskin hjá Ann
Eysturoy: Shellstø›in í Gøtudali
Statoilstø›in í Skálabotni
Streymoy: Shellstø›in í Vestmanna
Kunningarstovan í Havn
3´arin í SMS
Sandoy: Shellstø›in á Sandi
Su›uroy: Shellstø›in á Tvøroyri
Shellstø›in á Bakka í Vagi
Nólsoy: Matvørubú›in

Alive Music

Stu›la tiltakinum hava: Hestprent • Atlantic Airways • Føroya Bjór